# Kunngerð um Mentanargrunn Landsins

Nr. 109 – 21. september 2000

Við heimild í § 4 í løgtingslóg nr. 84 frá 17. mai 2000 um Mentanargrunn Landsins verður ásett:

*Endamál*

**§ 1.** Mentanargrunnur Landsins veitir stuðul til tey í § 1 í løgtingslóg um Mentanargrunn Landsins nevndu endamál, herundir starvslønir, íverk-setanarstuðul, stytri skeið hjá listafólkum og stuðul til ymiskar verkætlanir.
*Stk. 2.* Mentanargrunnur Landsins kann harumframt eftir umsókn stuðla bóka- og fløguútgávur upp til 30% av útgávukostnaðinum.
*Stk. 3.*Vísindaligt arbeiði, framsýningar, framførslur o.l. kunnu eftir umsókn fáa stuðul.

*Nevndin*

**§ 2.** Mentanargrunnur Landsins verður stjórnaður av nevnd við 5 limum, sum landsstýrismaðurin í undirvísingar- og mentamálum tilnevnir. Landsstýrismaðurin tilnevnir 5 varalimir. Tveir av nevndarlimunum og tveir av varalimunum skulu tilnevnast eftir tilmæli frá Listafólkasambandi Føroya.
*Stk. 2.* Nevndin umsitur sjálvstøðugt játtanina á fíggjarløgtingslógini og aðrar inntøkur.
*Stk. 3.* Nevndin ásetir gjøllari reglur fyri virksemi sítt í starvsskipan, ið skal góðkennast av landsstýrismanninum.

*Umsóknir*

**§ 3.** Nevndin kunnar almenningin um møguleikan at søkja um stuðul úr grunninum og skal seta eina freist at lata umsóknir inn.
*Stk. 2.* Umsókn verður skrivað á umsóknarblað Mentanargrunsins.

*Starvsløn*

**§ 4.** Endamálið við starvslønunum er at geva listafólkum og øðrum, ið takast við mentanarligt virksemi arbeiðsnáðir í eitt ávíst tíðarskeið at starvast burturav við listaligum ella øðrum mentanarligum arbeiði.
*Stk. 2.* Starvsløn verður latin umsøkjara við støði í verkevni ella verkætlan, sum lýkur krøvini í § 1 í løgtingslóg um Mentanargrunn Landsins og eftir nevndarinnar meting av listaligum ella fakligum dygdareyðkennum.
*Stk. 3.* Starvslønir kunnu verða latnar soleiðis:
1 starvsløn galdandi í 3 ár
2 starvslønir galdandi í 1 ár
umframt starvslønir galdandi í 1 til 6 mánaðar.
*Stk. 4.* Starvslønin um mánaðin svarar í upphædd til læraraløn á fólkaskúlans lønarstigi 21, stig 1.
*Stk. 5.* Nevndin ger sjálv av, hvussu nógvar starvslønir verða latnar, tó skal samlaða útreiðslan til starvslønir fyri eitt játtanarár ikki vera meira enn helmingurin av samlaðu játtanina til Mentanargrunn Landsins.

*Íverksetanarstuðul*

**§ 5.** Endamálið við íverksetanarstuðlinum er at stuðla einstaka skapandi yrkislistafólkinum, serliga ungum listafólki. Íverksetanarstuðulin skal lætta um hjá evnaríkum listafólkum at koma víðari við teirra skapandi listaarbeiði.
*Stk. 2.* Íverksetanarstuðul verður latin eftir nevndarinnar meting av listaligum dygdareyðkennum.
*Stk. 3.* Íverksetanarstuðul er á kr. 75.000,- árliga, og verður upphæddin árliga lagað til sambært prístalinum hjá Fíggjarmálastýrinum. Íverksetanarstuðulin kann nýtast til tilfar, leigu av atelier, námsferðir, livikostnaði o.l.
*Stk. 4.* Íverksetanarstuðul kann bert latast sama persóni eina ferð og í mesta lagi fyri tvey ár.
*Stk. 5.* Nevndin ger sjálv av, hvussu nógvir íverksetanarstuðlar verða latnir, tó skal útreiðslan til íverksetanarstuðul ikki vera meira enn 10% av samlaðu játtanini til Mentanargrunn Landsins.

*Verkætlanir og mentanarligt virksemi sum heild*

**§ 6.** Stuðul til ymiskar verkætlanir og stuðul til vanligt mentanarligt virksemi sum heild verður latin eftir umsókn til Mentanargrunn Landsins.
*Stk. 2.* Nevndin ger, við atliti at § 1 í løgtingslóg um Mentanargrunn Landsins, sjálv av, hvørjar umsóknir verða stuðlaðar, og hvussu stórur stuðulin skal vera í hvørjum einstøkum føri.

*Treytir o.a.*

**§ 7.** Stuðulsmóttakari skal lata nevndini fyri Mentanargrunni roknskap og frágreiðing, eftir at tiltakið er av, tó í seinasta lagi 1. mars árið eftir játtanarárið.
*Stk. 2.* Gongur verkætlan yvir fleiri ár, verður frágreiðing at meta sum ávegisfrágreiðing, sum verður latin Mentanargrunninum hvørt ár.
*Stk. 3.* Starvslønarmóttakarin skal bert lata inn frágreiðing ella ávegisfrágreiðing.
*Stk. 4.* Hevur starvslønarmóttakari fingið annan stuðul, letur hann inn roknskap fyri hendan partin eftir vanligu reglunum.

*Gildiskoma*

**§ 8.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Undirvísingar- og Mentamálastýrið, 21. september 2000

**Torbjørn Jacobsen (sign.)** / Jóannes Dalsgaard (sign.)
*landsstýrismaður*